# COME BACK?

**INNAN** EITT ÁR SKULU **FØROYINGAR** AFTUR Á **VAL**. NÝTT **LØGTING** SKAL **VELJAST**, OG HØRÐ **KAPPING** VERÐUR UM TEIR 33 **TINGSESSIRNAR**. VIT HAVA **SPURT** NAKRAR **POLITIKARAR**, SUM **IKKI** ERU Í **LØGTINGINUM** Í **LØTUNI**, UM TEIR **ÆTLA** AT STILLA **UPPAFTUR** OG **ROYNA** AT GERA **COMEBACK** SUM **LØGTINGSLIMIR**

## Eg eri liðugur við politikk

### Signar á Brúnni

**TJÓÐVELDI**
**Fyrrverandi løgtings- og landsstýrismaður**



Eg kundi ikki funnið upp á at stilla upp aftur til løgtingsval. Eg stórtrívist í arbeiðnum, sum eg havi nú, og tað kemur ikki upp á tal at fara upp í politikk aftur.

Eg var politikari í næstan 35 ár, og tað var ein góð og spennandi tíð, men tað er farið aftur um nú. Eg eri liðugur við politikk. Nú eri eg skúlastjóri í Klaksvík, og tað dámar mær sera. Eg eri eldhugaður í arbeiðnum at menna skúlaskap í Klaksvík.

Støðan í føroyskum politikki er verri, enn hon nakrantíð hevur verið. Sjálvsøkni er størri enn nakrantíð. Tað snýr seg bara um at koma fram, gera vart við seg, verða hoyrdur og sæddur. Og kanst tú markera teg ímóti tínum egna flokki, so er tað best. Tí er eingin struktueraður politikkur, og tað ringasta er, at tapararnir eru teir politikararnir, sum arbeiða seriøst í tí stilla og fáa úrslit burtur úr sínum arbeiði.

## Løgmanssessurin er undantakið

### Kristian Magnussen

**JAVNAÐARFLOKKURIN**
**Fyrrverandi løgtings- og landsstýrismaður**

Eg stilli ikki uppaftur. Lívið sum politikkari er ein farin tíð. Eg havi sæð skriftina á vegginum, tí eg misti um 80 prosent av atkvøðunum til seinasta val. Eg eri sosialráðgevi í Tórshavnar kommunu, og tað fer við mínari tíð. Einasta undantakið er, um tað stendur mær í boði at vera løgmaður. Eg siti framvegis í starvsnevndini í Javnaðarflokkinum, so eg eri framvegis aktivur í flokkinum, men eg verði ikki valevni hjá flokkinum aftur.



## Eg eri politiskt óheftur

### Georg L. Petersen

**SAMBANDSFLOKKURIN**
**Fyrrverandi valevni**



Nei, eg ætli mær so bestemt ikki at stilla uppaftur. Eg royndi meg á valinum í 2008, og eg fekk mín dóm. Undirtøkan var lítil, og tað staðfesti væl og virðiliga, at eg skal ikki vera politikkari. Eg starvist sum fjølmiðlamaður, og eg eri politiskt óheftur. Eg eri ikki limur í nøkrum politiskum flokki. Mín leiklutur í føroyskum politikki verður tískil sum fjølmiðlamaður í framtíðini.

## Havi ikki tol at vera politikari

### Malan Johansen

**SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN**
**Fyrrverandi valevni**

Eg eri ofta spurd, um eg havi hug at bjóða meg fram, men áhugin at royna meg sum politikari er ikki tann sami sum fyrr. Eg trívist væl í Virðisbrævamarknaði Føroya. Onkursvegna var tað meira lokkandi, tá eg stillaði upp í 2004. Eg havi umhugsað støðuna ofta, men eg havi fingið eina dóttur, og gerandisdagurin er broyttur. Eg veit ikki at siga, um støðan hevði verið ein onnur, um eg varð vald seinast. Eg eri av tí sannføring í dag, at eg havi ikki tol at vera politikari, so eg vil heldur gera mína ávirkan galdandi á annan hátt. So nei, eg fari ikki bjóða meg fram hesaferð.



## Eg havi ikki tikið støðu

### Páll á Reynatúgvu

**TJÓÐVELDI**
**Fyrrv. løgtingsmaður**



Satt at siga, so veit eg ikki, um eg ætli at bjóða meg fram. Eg havi ikki hugsað stórvegis um tað, og tískil ikki tikið støðu. Persónliga hevði eg eitt buldrasligt heyst, tá eg noyddist frá sum borgarstjóri á Sandi, og tað ávirkar sjálvsagt eisini familjuna. Tað eru fyrimunir og vansar við at vera politikari. Tað er serliga stuttligt og spennandi at hava ávirkan, tá tingini fara tann vegin, tú sjálvur heldur vera rætt. Men nú fáa vit at síggja. Eingin veit, nær løgtingsvalið verður, men eg taki støðu, tá tað nærkast.